Álit

í

løgtingsmáli nr. 76/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. (Avtøka av kærunevnd trygdargrunsins)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 18. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna Kárason Petersen, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Álit um Føroya Kærustovn var handað løgmanni í oktober 2020. Í álitinum varð mælt til at avtaka kærunevndirnar og flyta avgerðarheimildirnar til Føroya Kærustovn. Løgtingslóg um Føroya Kærustovn kom í gildi 25. november 2021, og í 2022 varð farið undir at umskipa Kærustovnin, soleiðis at Kærustovnurin gjørdist sjálvstøðugur myndugleiki.

Nevndirnar, sum vóru knýttar at Kærustovninum, vórðu tiknar av yvir eitt tíðarskeið, og avgerðarheimildirnar fluttar til Kærustovnin. Fyrstu nevndirnar vórðu avtiknar 1. januar 2022, og seinasta nevndin varð tikin av 1. januar 2024.

Hetta uppskotið snýr seg um at leggja kæruviðgerðina fyri avreiðingar og lønir undir Kærustovnin. Nevnda kærunevnd hevur bert havt einstøk mál seinnu árini, og nevndin skal veljast av nýggjum, um hon skal halda fram óbroytt, tí valskeiðið fyri núverandi limir er runnið.

Í dag eru kærunevndirnar fyri hesi øki avtiknar og heimildirnar lagdar til Kærustovnin:

- Almanna-, familju- og heilsumál
- Skatta- og avgjaldsmál
- Lestrarstuðulsmál
- Skuldarumskipanarmál
- Lendismál
- Vinnumál
- Arbeiðsloysisskipanarmál
- Barsilsskipanarmál
- Psykiatrisk sjúklingamál
- Barnaverndarmál
- Tvingsilsmál
- Náttúruverndarmál

Fíggjarnevndin metir tað vera skilagott at avtaka kærunevndirnar og flyta avgerðarheimildirnar til Føroya Kærustovn, og tekur ein samd nevnd tí eisini undir við at flyta tær heimildir, sum kærunevnd trygdargrunsins hevur í dag, til Kærustovnin.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. apríl 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	